## Fólkatingið meldast

Mikudagin skal formansskapurin í danska fólkatinginum taka støðu til, um politikararnir framhaldandi skulu sleppa at roykja á skrivstovum sínum. Starvsfólk á Christianborg krevja, at politikararnir ikki roykja har, og vísa til nýggju roykilógina. Men løgfrøðingar hjá fólkatinginum siga, at henda ikki umfatar einstøku skrivstovurnar. Jørgen Arbo-Bæhr, framsøgumaður í heilsumálum hjá Enhedslisten, sigur sambært BT, at um formansskapurin játtar royking á skrivstovunum, so verður fólkatingið meldað til Arbeiðseftirlitið tann 15. august klokkan átta, tá lógin kemur í gildi.



## Teldutøk útgáva um fjølmiðlar

Fríggjadagin kom Føroya fyrsta teldutøka útgáva við einum ISBN-tali komin út. Allar prentaðar útgávur hava vanliga eitt ISBN-tal, sum er ein altjóða skráseting av øllum útgávum, og hetta er so fyrsta føroyska teldutøku útgáván við tílíkum skrásetingarnummari. "Fjølmiðlar" eitur útgávan, og hon leggur upp til at fylgja við í fjølmiðlunum, eins og at kunna seg um pressufrælsi bæði úti og heima. Tilfarið um fjølmiðlar er fyrst og fremst ætlað at brúka á miðlabreyt í 10. flokki, men kann eisini brúkast á miðnámi og í elstu flokkunum í fólkaskúlanum. Tað er Føroya Skúlabókagrunnur, sum gevur út teldutøku útgávuna.



## Mótin við føroysk-um eygum

Føroyski stylisturin Marianna Mørkøre hevur saman við svensku myndakvinnuni Mariu Arnell, gjørt mótatilfar til svenska mótatíðarritið Swarta.

Myndarøðin er av klæðum frá eitt nú Wood Wood, Henrik Vibskov, Minimarket, C.neeon, Bless og G&G, og er í stuttum hvussu hesin føroyski stylisturin og henda svenska mynakvinna síggja mótaheimin í løtuni, lýst á ein heldur ósiðbundnan hátt. Allar myndrnar eru tiknar í Føroyum.

Swarta er eitt fotografiskt tíðarrit, og í fyrstu útgávuni verður serligur dentur lagdur á mótafotografi. Tíðarritið verður selt í útvaldum støðum í Evropa. Meira kann lesast um tíðaritið á HYPERLINK www. swarta.com swarta.com.

Tilber at síggja myndirnar á heimasíðuni hjá teimum báðum kvinnunum: HYPERLINK "http:// www.marmar.nu/ dreamcatcher/" www. marmar.nu/ dreamcatcher/ Trýst síðan á Dreamcatcher. Tú blaðar millum myndirnar við at trýsta á lítla pílin undir mydini.

**nud**

# Blandað føroysk av



*Ummælarin keddi seg á konsertini við Eivør*
*mynd: Símun Jóannesarson*

**Um vikuskiftið hevur árligi SPOT-festivalurin verið í Århus, føroysku nøvnini Eivør, Budam, Boys In A Band og Maria Guttesen hava luttikið, og skoðsmálini hava verið heldur ymisk**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í samstarvi millum gaffa. dk, mymusic.dk og SPOT verða allar konsertirnar á SPOT-Festivalinum ummældar. Meðan Budam fær eitt framúrskarandi ummæli og fimm av seks møguligum stjørnum, so eru ummælini av Eivør og Boys In A Band minni jalig, og bæði nøvnini fáa tríggjar av seks stjørnum. Maria Guttesen spældi á eini felagskonsert, sum somuleiðis fekk tríggjar av seks stjørnum, men Maria varð ikki nevnd við einum orði. Øll ummælini liggja á spot-festival.dk.

### At hoyra porno

Budam ella Búi Dam verður lýstur, sum ein stórur karismatiskur sangari úr Føroyum, ið tók yvir ein lítlan pall við manér. Serliga røddin, ið var djúp og forførandi og hansara evnir at framføra síni løg, sum lítlar sjónleikir, verða tikin fram í ummælinum. Men eisini fráliki tónleikurin, sum bólkurin leggur sum grund undir rødd hansara, fær jalig orð.

Budam er kendur fyri sínar sterku tekstir, og hesir hava eisii talað til Anju Fjølleslev, ið ummældi konsertina fyri Gaffa. Um lagið Do That Thing, skrivar hon: "Introen, flere mellemstykker og outroen bestod af stærke vejrtrækninger, som mindede om vindens susen og havets brusen. Ved nærmere nærlytning af teksten kunne disse vejrtrækningseffekter dog også tolkes som noget helt andet. Hvis jeg nævner en linje i teksten, som publikum i øvrigt omtalte bagefter, som om at de havde "hørt porno", er jeg sikker på, alle forstår, hvad jeg mener. Budam sang: "I'll paint your body with my loaded cream machine". Dette er ikke det eneste eksempel under koncerten på Budams udfordrende tekstunivers."

Ummælarin endar við at ynskja sær, at Budam skjótt aftur verður at hoyra í Danmark, tí tað hevur tónleikurin uppiborið.

### Fólk rýmdi frá Eivør

Á SPOT-Festivalinum spældi Eivør saman við írska bólkinum, ið hon skal á pall saman við á G!Festivalinum, og skulu vit trúgva ummælaranum Mikkel Elbech, kann hetta gerast ein langdrigin uppliving.

Ummælarin skrivar, at Eivør kom á pall ein hálvan tíma seinkað, men hóast hetta vóru áskoðararnir spentir, og karmarnir tyktust fullkomnir til konsertina.

Men longu eftir byrjanini við løgunum Human Child og Do Not Weep, tyntist álvarsliga út í áskoðarafjøldini, og sum konsertin fráleið rýmdu sambært ummælaranum alt fleiri fólk, og hann sigur, at tað somuleiðis gjørdist greitt hví. Tí á SPOT-festivalin, ið leggur dent á tað nýskapandi og áhugaverda tykist Eivør malplasera.

Hann heldur fram: "Med tekster, der handler om træer, snefnug og solskin, er der dømt floskel-fest til den store guldmedalje, og langt det meste af tiden er koncerten en noget banal og ordinær affære. Musikalsk set er der ingen elementer, som ikke fås i bedre udgaver andetsteds.

Niðurstøðan tá konsertin endar eftir 38 minuttir, er sambært ummælaranum, at hesir kendust sum munandi longri tíð. Tá fleiri av áskoðarunum klappa hana útaftur á pallin, bjargaði eykalagið